

Mynd: ENI

# Goliat er á veg til Barentshavið

**Jógvan Hugo Gardar**

14.02.2015 - 18:56

Oljan.fo

Í nátt byrjaði ferðin hjá boripallinum Goliat úr Korea til Norður-Niregs. Pallurin er bygdur á skipasmiðju í Korea, og stendur nú á einum av heimsins størstu skipum, Dockwise Vanguard. Mett verður at Goliat kemur til Hammerfest í apríl, skrivar ENI í einum tíðindaskrivi.

Í Hammerfest skal seinasta hond leggjast á boripallin, áðrenn hann skal út í Barentshavið í summar, har hann skal standa á Goliat-økinum, einar 80 kilometrar úr landi.